*Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út*

## Ali Baba og teir fjøruti ránsmenninir




Peter Maltha hevur endursagt og teknað bókina, og Óla Jákup Niclasen týddi úr donskum.

Ævintýrini úr heimsgitna søgusavninum »Túsund og eina nátt« eru tiltikin og mangan endursøgd.

Søgurnar um Sinbad sjófaran, Aladdin og Ali Baba eru givnar út í óteljandi útgávum, og nú hevur so danin Peter Maltha á skemtiligan hátt teknað og endursagt ævintýrið um hin fátta, ærliga brennihøggaran Ali Baba, sum av tilvild uppdagar loyndarmálið hjá teimum fjøruti ræðuligu ránsmonnunum. Og takka verið kloku konu hansara, Morgianu, endar alt væl hjá teimum báðum, meðan kradduti og tvørri beiður hansara, Kassim, fær uppiborna revsing. Eitt ræðuligt ævintýr, sum hevur hug tikið fólk í meira enn fýra hundrað ár.

Peter Maltha var í Miðeystri og kunnaði seg um bygnisið og umhvørvi, áðrenn hann fór undir bókina, sum hevur fingið sera góða undirtøku í hinum Norðurlondunum.

»Ali Baba og teir fjøruti ránsmenninir« er stór myndabók, 28 síður í litum og kostar 75 kr í bókhandlunum. Pf Gramar hevur staðið fyri prentgerðini.

*20-30 oljufeløg við í stórari umhvørvisverkætlan á føroyskum øki:*

# Oljufeløg og føroyskir stovnar saman um stóra verkætlan

*Ein av teimum størstu einstøðu umhvørvisverkætlanum nakrantíð í søguni verður nú veruleiki á føroyska landgrunninum. Tað snýr seg um at skráseta umhvørvi, veður og upplýsingar í føroyska sjóøkinum, áðrenn landgrunnurin verður boðið út til oljuboring. Talan er um eitt samstarv millum millum 20 og 30 oljufeløg og føroyskar stovnar og myndugleikar. Verkætlanin kann koma at kosta einar 50 mill. kr. og fer sum so at geva nógv arbeiði til føroyskar granskarar og fakfólk annars.*

JAN MULLER




Sum ein liður í fyrireikingunum til eitt leitingarskeið á føroyskum øki, hevur eitt tal av oljufeløgum (umleið 22 feløg í núverandi løtu) byrjað eitt samstarv við ti endamáli at skráseta umhvørvi, veður og upplýsingar (data) í føroyska sjóøkinum.

Samstarvið er eitt samtak við heitinum »Faroes Geotechnical, Environmental and Metocean Network (G.E.M.)«. Setningurin hjá samtakinum er at skráseta og útvega landafrøðiligar/jarðtøkniligar, havlívfrøðiligar og veðurfrøðiligar/havfrøðiligar upplýsingar í føroyskum sjóøki, sum kann verða boðið út til leitingarboringar eftir olju og gassi.

Innsavnaðu upplýsingarnir verða partur í teimum greiningum av trygd og umhvørvi, sum oljufeløgini fara at bruka fyri at vísa á, at teirra verkætlanir fara at verða framdar á ein full góðan hátt trygd og umhvørvi viðvíkjandi.

Nevndu oljufeløg fara at samstarva við føroysku vísindastovnarnar og almennu stovnarnar um nevndu uppgávuna, og samstarvið er formaliserað, at báðir partar eru umboðaðir í einari felags stýrinevnd fyri G.E.M.

Einstøku fakbólkarnir eru samansettir av umboðum fyri oljufeløgini og føroysku stovnarnar. Partverkætlanir, sum eru liður í uppgávunum við at útvega og skráseta upplýsingar, verða samskipaðar og stýrdar frá Tórshavn gjøgnum eina verkætlanarsamskipan. .

**50 mill. kr.**

Verkætlanin er mett at kosta ikki minni enn hálvthundrað milliónir krónur og fer at vara í nøkur ár.

Tað er greitt, at slík ætlan fer at geva tí føroyska granskingarumhvørvinum nóvar nýggjar og spennandi avbjóðingar, tí kanningin røkkur og fevnir so víða.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa nøvnini á teimum feløgum, sum fyribils hava játtað at vera við í ætlanini, men eftir teimum upplýsingum vit hava kunnað útvegað okkum er talan um tey somu feløgini, sum hava víst áhuga fyri føroyska økinum higartil. 18 av teimum vóru við til at fíggja Lopransboringina. 23 vóru við í royndarnominatiónini herfyri, og nú eru so fyribils 22 við í umhvørvisætlanini, men blaðið skilur, at eisini fleiri onnur feløg eru hugað fyri at verða við.

Feløgini, sum eru við í ætlanini eru (okkara metingi): Fyrst teir fýra bólkarnir, sum hava skipað seg:

BP og Shell, Amerada Hess, Dong, Lasmo og Norsk Hydro, Statoil, Mobil og Enterprise. Texaco, Conoco og Murphey Oil, Fina, Deminex og Mærsk Olie og Gas og síðani einstøk feløg, sum enn ikki hava skipað seg í bólk: Esso, Saga, Arco, Amoco, British Gas, Phillips og BHP

Síðani skilst, at eisini Agip og Marathon vísa tiltakinum ans. Onnur feløg, sum annars hava víst føroyaøkinum nakað av áhuga men sum helst enn ikki hava avgjørt, um tey skulu vera við í fyrsta útbjóðingarumfarinum, eru: Total, Elf, Anadarco og Dana.

Tvey oljufeløg, sum hava verið áhugað í føroyska økinum, hava av eini ella aðrari orsøk tikið seg aftur. Hesi eru Chevron og Union Texas.

ORGANDONOR

TAG STILLING SAMMEN MED DINE NÆRMESTE

DONORKORT

SUNDHEDSSTYRELSEN

Eg ynski at gerast limur í

Navn

Gøta

Býur/bygd

AMNESTY INTERNATIONAL
Føroya Deild
Postboks 1075
FR-110 Tórshavn
Postgiro 56359